# Í fongsul fyri at brúka øks

Ein russiskur sjómaður varð í gjár dømdur eitt árs fongsul fyri at hava lopið á ein skipafelaga við øks. Tað skrivar Nordjyske Stiftstidende. Tilburðurin var umborð á ferjuni „Pride of Telemark", meðan hon lá við bryggju í Frederikshavn tann 8. mars. Tann russiski sjómaðurin og ein av feløgum hansara vóru komnir til ilnar um eitt ella annað, og tað endaði við, at tann 28 ára gamli russarin fór eftir einari øks og høgdi eftir hinum. Hóast hin maðurin royndi at verja seg, bleiv hann raktur í annan kjálkan og aðra hondina. Umframt fongsulsdómin bleiv russiski sjómaðurin vístur úr Danmark.



# Vilja hava meiri vald

Í USA vilja Timothy Geithner, fíggjarmálaráðharri, og Ben Bernanke, tjóðbankastjóri, hava meiri vald. Tað gjørdu teir greitt undir einari hoyring í Kongressini í gjár, tá Kongressin viðgjørdi støðuna hjá tryggingarfelagnum AIG. Undir hoyringini segði Timothy Geithner, at støðan hjá AIG hevur avdúkað veikleikar í amerikonsku skipanini, og at stig mugu takast fyri at sleppa undan endurtøku. Hann og Ben Benanke vóru eisini á einum máli um, at tað er neyðugt at endurskoða lønarskipanina í amerikanska fíggjarkervinum, og at myndugleikarnir mugu fáa størri vald til at taka neyðug stig.

# Krevja at bankarnir skulu lækka rentuna



*Høgni Hoydal heldur, at bankarnir gera sær dælt at kreppuni til at økja um vinningin ístaðin fyri at lækka rentuna hjá vanliga lántakarunum. Og tað vil hann nú hava politiska myndugleikan at seta eitt stoppara fyri, so at rentan kann lækka, so at vanligi brúkari fær ágóðan av almennu hjálpini, sum bankarnir hava fingið fyri at yvirliva kreppuna*

**Høgni Hoydal vil hava politikiska myndugleikan at krevja, at bankarnir lækka rentuna og hann fer nú at taka málið upp bæði í Løgtinginum og í Fólkatinginum**

RENTUSTØÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Nú eigur politiski myndugleikin at krevja av bankunum, at teir lækka rentuna.

Tað heldur Høgni Hoydal, løgtingsmaður og fólkatingsmaður.

Hann átalar bankarnar tí hann heldur, at teir gera sær dælt av kreppuni í samfelagnum til at tiltuska sær størri vinning.

Bankarnir hava fingið almenna hjálp tvær ferðir og samstundis hevur Tjóðbankin lækkað rentuna.

Men Høgni Hoydal heldur ikki at føroyski bankarnir hava lækkað rentuna nóg nógv.

- Føroysku peningastovnarnir hava ikki lækkað rentuna samsvarandi rentulækkingini hjá Tjóðbankanum og harafturat hava teir økt um rentumarginalin so at útlánsrentan er lækkað minni enn innlánsrentan.

- Sostatt hava bankarnir brúkt hetta sum eitt høvi til at økja um vinningin.

Høgni Hoydal sigur, at hann skilir fullvæl bankarnar, at teir royna at økja um vinningin, har tað ber til.

Men hann heldur, at tað eigur at vera eitt treytaleyst krav frá politikarunum til bankarnar, at lántakarin eisini fær nóg stóran ágóða av tí almenna stuðuli, sum bankarnir hava fingið og av rentulækkingunum, sum hava verið.

So vítt, hann hevur fingið upplýst, hava bretskir og týskir myndugleikum kravt av bankunum har, at teir lækka rentuna, so at vanliga fólkið eisini fær ágóðan av teimum, so at teir ikki.

- Tað líkist ongum, at almennu bjargingarpakkarnir í stóran mun verða brúktir at økja um vinningin hjá bankunum, sigur hann

### Lántakarin skal hava ágóðan

Hann hevur ikki roknað út, hvussu nógv ov høg rentan í Føroyum er.

Men hann heldur, at skulu bankarnir hava nakað úr almennu bjargingarpakkunum, eigur ein treyt at fylgja við og tann treytin skal vera, at hetta eisini kemur vanliga lántakaranum til góðar.

Sostatt heldur hann, at tað eigur at verða eitt krav til bankarnar, sum fáa lut í almennu bankapakkunum, at teir eisini lækka rentuna tilsvarandi.

- Eg haldi ikki, at bankarnir í Føroyum hevur lækkað rentuna í tilsvarandi mun, sum Tjóðbankin hevur gjørt og tað eigur politiski myndugleikin at áleggja teimum.

- Tað er vanligi lántakarin, sum er sperdur og tí eigur hann at fáa fullan ágóða av, at bankarnir nú fáa almennan stuðul.

Sum heild heldur Høgni Hoydal annars ikki, at treytirnar til bankarnar eru nóg strangar.

Hann sigur, at politiski myndugleikin hevur vissa sær so lítla trygd í teirri hjálp, sum bankarnir fáa, at tá ið gongdin vendir aftur, er stórur vandi fyri, at onki sum helst gjøgnumskygni er í, hvør tað nú var, sum fekk ágóðan av hjálpini.

- Tað er vandi fyri, at tað hjá bankunum liggja nakrir stórir vinningsmøguleikar í hesum bjargingarpakkunum, sum als ikki vóru tilætlaðir.

### Tekur málið upp

Høgni Hoydal sigur, at hann fer nú at taka málið upp bæði í Løgtinginum og í Fólkatinginum.

Hann staðfestir, at lógarverkið er danskt og tí kann Løgtingið onki gera við málið. Men hann fer at reisa tað í Løgtinginum sum ein fyrispurning til landsstýrið um ætlanin er at fáa slíkar treytir í bankapakkan.

Hann fer eisini at reisa málið í Fólkatinginum sum ein fyrispurning til donsku stjórnini fyri at vita um ætlanin er at seta bankum, sum fáa úr bjargingarpakkanum, treytir um at lækka rentuna fyri vanliga lántakaran.

Hann vísir aftur, at hetta er politisk upp í legging í raksturin hjá bankunum

- Sjálvandi skulu politikarar ikki áseta bankarentuna. Men tá ið bankarnir koma illa fyri og mugu hava almenna innspræning fyri at klára seg, má politiski myndugleikin eisini tryggja sær, at hendan almenna hjálpin ikki fer í skeivar lummar, men at vanligu løntakarin eisini fær ágóðan av hjálpini, sigur Høgni Hoydal.

Men nú hava bankarnir ført fram, at tað er blivið dýrari hjá teimum at læna pengar og tí er neyðugt at økja um vinningin.

- Sjálvandi kunnu orsøkirnar verða sakligar, men vit eiga at binda um heilan fingur, so at bankarnir í mest møguligan mun lata vanliga lántakaran merkja ágóðan av teirri almennu kreppuhjálp, bankarnir fáa.

# Suðuroyingar hjálpa børnum í Afrika

**Fríggjakvøldið verður fjølbroytt kvøldseta á Seglloftinum á Tvøroyri, har møguleiki bæði verður at síggja finaluna í X-Factor á stórskíggja, umframt at hoyra um stórar verkætlanir í Suðuroy, um tiltikin skipbrot og um eina verkætlan í Afrika, sum føroyingar eru við í**

VÆLGERÐANDI ENDAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Saman við øðrum gevur Bina Svartá børnum í Afrika vónir um eina bjartari framtíð. Tað vil Lions Klubburin í Suðuroy fegin stuðla og tað ger hann við forvitnisligari kvøldsetu fríggjakvøldið*

Fríggjakvøldið verður áhugaverd kvøldseta á Seglloftinum í Tvøroyri.

Tað er Lions klubburin í Suðuroy, sum skipar fyri og allur peningurin fer til vælgerandi endamál.

Tiltakið byrjar klokkan 19 og lagt verður til brots við at hyggja at á stórskíggja, hvussu Linda klárar seg í finaluni í X factor.

Aftaná finaluna fer Bina Svartá at greiða frá um forvitnisligu verkætlanina við Pepi fólkinum í Ghana og tá ið hon er liðug, fara tey aftur at fylgja við sjálvari avgerðini í X.

Annars verður talan um eina fjølbroytta skrá. Mathias Lassen fer at greiða frá Westerbeek, sum gekk burtur vestantil á Suðuroy og sum hann hevur skrivað drúgva og væl undirbygda bók um. Ólavur Rasmussen fer at greiða frá um eftirskúlan í Hvalba og um aðrar norðurlendskar verkætlanir og Hans Jørgensen fer at greiða frá um, tá ið Blikur hjá Skipafelagnum gekk burtur á Kappanum í 1963.

Í steðginum er kaffi og annað gott at fáa. Tað er eisini nógvur og góður sangur á skránni, har Theodor Petersen, Jens Eli Ellefsen og vinmenn, fara at syngja og spæla, men felagssangur er sjálvandi eisini á skránni.

Lions savnar pening inn til vælgerðandi og mentanarligendamál og peningurin, sum kemur inn á kvøldsetuni fríggjakvøldið, fer óskerdur til verkætlanina hjá Binu Svartá og hinum í Afrika, har tey hava bygt ein skúla fyri at útbúgva pepi fólkið í Ghana. Tey, sum vilja kunna seg um hesa verkætlanina, kunnu fara inn á heimasíðuna www.pebichildrencenter.dk.

Tað kostar 150 krónur at koma inn, men atgongumerkið er samstundis lutaseðil til eitt gávukort upp á 1000 krónur í olju frá Magn.